VINNU SÍÐURNAR

Nr. 121 • mikudagur • 29. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Áhugaverd ráðstevna um fiskiskap undir Føroyum komandi árini

**Tann 6. juli verður almenn ráðstevna í Norðurlandahúsinum, sum Fiskimálaráðið og Fiskirannsóknarstovan skipa fyri**



*Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, vil fegin hava eitt breitt kjak um tilmælini um fiskidagar og fiskidagaskipanina*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Til umrøðu á ráðstevnuni verður fiskiskapurin komandi árini, og lagt verður fyri klokkan 9, har Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, bjóðar vælkomin.

Tað verður leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, sum leggur fyri við veiðihagtølum seinastu 100 árini.

### Tilmælini

Jákup Reinert og Óli Samró fara ávikavist av greiða frá tilmælinum hjá Fiskirannsóknarstovuni og Fiskidaganevndini, og síðan fer Kristin Rasmussen at greiða frá fiskiorkuni á landgrunninum og Føroyabanka.

Stutt fyri middag fara Petur Steingrund og Eilif Gaard at greiða frá um gróður og fiskiskap, og beint eftir ábit fer fiskifrøðingurin, J.J.Maguire, at greiða frá regluni um fyrivarni í fiskiskapi og vistfrøðiligum atliti.

### Marknaðurin

Seinnapartin fer stjórin í United Seafood, Meinhard Jacobsen, at greiða frá teimum krøvum, sum marknaðurin setir og seinasti røðarin, Kjartan Hoydal, fer at enda at reisa spurningin: "Fiskidagaskipanin í 9 ár – hvat nú?"

Áðrenn pallborðsorðaskifti, sum byrjar beint fyri klokkan 15 við Herálvi Joensen sum orðstýrara, verður kaffi.

Tað er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, sum saman við Fiskirannsóknarstovuni bjóðar til hesa ráðstevnu, og málið er at skipa fyri einum breiðum orðaskifti um tilmælini og aðrar spurningar, sum hava týdning fyri vinnuna.

### Orðaskifti

- Fiskiskapurin undir Føroyum hevur seinastu árini verið skipaður við fiskidøgum. Bæði vinna og myndugleikar eru sum heild vælnøgd við skipanina. Pláss er tó altíð fyri ábótum, og tað er ynski hjá landsstýrismanninum, at orðaskifti eisini verður um sjálva skipanina, siga Fiskimálaráðið og Fiskirannsóknarstovan í innbjóðingini til ráðstevnuna.

Ráðstevnan um fiskiskapin komandi árini er opin fyri øllum, og kostnaðurin fyri luttøku er kr. 500 fyri hvønn luttakara.

Tey, sum ynskja at verða við á ráðstevnuni, kunnu seta seg í samband við Sólvu Olsen og Honnu E. Djurhuus, sum taka ímóti tilmeldingum á tlf. 353900

# Tá myllurnar m

**- Myllurnar verða bara bundnar inn á netið, og síðan verður streymurin reguleraður so hvørt úr Vestmanna. Henda skipanin er rímiliga sjálvvirkandi. Tað er soleiðis, at SEV til eina og hvørja tíð framleiðir ta nøgd av streymi, sum brúkt verður. Verður minni brúkt, verður minni framleitt – og øvut, sigur Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV**




VINDMYLLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Allar tríggjar vindmyllurnar, sum SEV hevur keypt frá Vestas, standa nú uppi í Neshaga.

Tann fyrsta er longu sett inn á netið, onnur var væntandi á netinum í gjár – og tann triðja og seinasta verður ætlandi á netinum hjá SEV í dag.

Henning Jacobsen, verkfrøðingur hjá SEV, sigur, at myllurnar eru keyptar við uppseting, og soleiðis er tað Vestas, sum hevur staðið fyri hesum arbeiði.

- Teir hava brúkt ein krana hjá Tórshavnar Skipasmiðju til uppsetingararbeiði, og haraftrat er ein stórur krani komin til landið til uppseting av seinasta og ovasta partinum av myllunum.

### 70 metrar høgar

Í mun til gomlu mylluna hjá SEV í Neshaga, eru tær



*SEV væntar*
*Neshaga eru*
*fara motora*
*verður stýrt*